skemt

# Vestmannabjørgini fingið vindeygu



Eitt tað best umtókta føroyska ferðamálið eru Vestmannabjørgini, sum eru stórsligin og hugtakandi. Nú er líkt til, at bjørgini kunnu verða eitt enn størri trekkplástur. Á myndini sæst ein reklamuveggur í Vestmanna, og sambært honum hava Vestmannabjørgini fingið vindeygu – men flott er tað í øllum førum!

# Taka pengar út úr kirkjuni




**Danir eru ósmædnir – men kanska skuldi eitt mark verið. Myndin omanfyri er tikin í Aalborg, og har sæst, at Danske Bank er fluttur inn í eina kirkju, og skeltini prýða nú hetta fyrrverandi Guds hús. Danske Banke hevur tó ikki lýst við einari kristnari konto ella ómaksgjaldi fyri konfirmatión ella barnadóp...**

# Trøðini vaksa út á netið



Vevmyndatól eru væl umtókt, og bæði privat og stovnar hava sett slík tól upp, sum kunnu varpa myndir mest sum beinleiðis út á internetið. Eitt av vevmyndatólunum vísir neyvan tað, sum ætlanin var, at tað skuldi vísa. Hetta vevmyndatólið á Vaglinum í Havn hevur antin flutt seg, ella er tað bara tað at trøini vaksa heilt út á internetið – tá tey nú ikki vaksa inn í himmalin.

# Í rangastrúpan

*Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.*

**Agøøø**
Dio er við sínum 65 árum enn líka orkufullur sum fyrsta dagin
Portalurin

**Tíbetur**
Øll tey føroysku listaverkini fylgja ikki við Føroya Banka
www.uf.fo

**Fløtabollar úr Italia**
Ræðast ikki Róma
Sosialurin

**Hvar fór vindurin?**
Vem kan segla forutan segl
Sosialurin

**Grind á vøllinum**
Tað kom øði í grindina á vøllinum í Gundadali
Dimmalætting

**Eitur hann ikki Stenberg?**
Ja, og so skuldu vit havt Jónas Strindberg hjá AB á tráðnum
Bólturin í Útvarpinum

## Leyst og fast um stórt og smátt

**B36 hevur fingið eitt nýtt stuðulsfelag, sum eitur "White Tigers". Nú vita vit í hvussu er, at B36-fjepparar ikki hyggja eftir "Animal Planet"!**

**Hevði Bigge stovnað eitt stuðulsfelag hevði tað itið "Bigga-mistarnir"!**

**Jan Muller, blaðstjóri, ætlar at skipa fyri einum tónleikatiltaki í Tórsgøtu. Tað skal eita: "Olju-grús"!**

**Jógvan Martin Olsen er nú endurreistur í eygunum hjá øllum fótbóltsáhugaðum føroyingum. Nú manglar hann bara at sleppa av við Claus-trofobiina hjá sær. Bech to business!**

**Tingmenn eru vanir við at vassa langt út. Og tí er sjálvsagt, at nýggju Løgtingshúsini skullu liggja á Kongabrúnni!**

**Uttanlands frættist, at føroyingar ætla at byggja eitt stórt akvarium við pussfiskum á Kongabrúnni!**